# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## DOWNTOWN ABBEY

Stórsligið sjónvarpsdrama, sum gongur fyri seg í tíðini fyri fyrra heimsbardaga. Oscar-vinnarin Julian Fellowes hevur skrivað handritið, og uppsetingin er hugtakandi og dramatisk. Vit fylgja lívinum á harragarðinum Downtown Abbey, og fylgt verður við í lívinum hjá bæði familjui og teirra tænastufólkum. Tað er idylliskt og friðarligt, hóast spenningar eru í luftini, men fyri framman nærkast eitt kríggj, sum fer at broyta heimin – eisini á Downtown Abbey.

**DOWNTOWN ABBEY**
Sjónvarprøð á dvd



## WATER FOR ELEPHANTS

Djóralæknin Jacob fær av tilvild arbeiði í einum ferðandi sirkusi. Har hittir hann Marlenu, sum er stjørnan í sirkusinum, og hann verður forelskaður í henni. Gjøgnum teirra alsk til djórini og serliga til fílin Rosie finna tey meining í sirkuslívinum. Einasta trupulleikin er August – maðurin hjá Marlenu.

**WATER FOR ELEPHANTS**
Biograffilmur
Frá hósdegnum 5/5



## MØLLEHAVE Í HAVN

Kendi danski presturin og rithøvundin Johannes Møllehave kann um vikuskiftið upplivast í Føroyum. Í næstu viku skal hann við Norrønu á ferð til Íslands, men sunnudagin verður hann í Norðurlandahúsinum, har hann og føroyski presturin Theodor Olsen fara at tosa um lívsins viðurskifti.

**MØLLEHAVE OG THEODOR**
Norðurlandahúsið í Havn
Sunnudagin 8/5 kl. 16.00



## BÁTAFESTIVALUR Á TOFTUM

Hetta vikuskiftið halda tey aftur bátafestival á Toftum. Byrjað verður longu í kvøld, men á middegi leygardagin verður siglt úr bátahylinum í Skálafirði og út á Toftir, og so verður av álvara lagt til brots við bátafestivalinum. Umframt hugnan, sum hoyrir til bátaumhvørvi, verður eisini skipað fyri uppboðssølu, tónleikaframførslum, sølu, undirhaldi til børnini og dansi.

**BÁTAFESTIVALUR Á TOFTUM**
Leygardagin 7/5



## FINNUR Í KOLLAFIRÐI

Finnur Jensen, sum er sangari í bólkinum Páll Finnur Páll, verður fríggjakvøldið at hoyra í Kollafirði. Finnur fer at hava konsert á Café Chill, har tey eisini hava pubquiz fyrr á kvøldinum. Finnur Jensen hevur javnan framførslur sum solistur, og hann spælir bæði sangir hjá Páll Finnur Páll og coversangir.

**FINNUR JENSEN**
Café Chill í Kollafirði
Fríggjakvøldið 6/5 kl. 23.00



## DYSTUR UM MEISTARAHEITIÐ

Í Onglandi er spenningurin ovurhondsstórur, nú tey bæði fremstu liðini í Premier League hittast til avgerandi dyst sunnudagin. Manchester United hevur verið greitt á odda, men hevur nú mist stóran part av leiðsluni. Chelsea kann við sigri á United sunnudagin fara fram um United, nú bert trý umfør eru eftir at spæla. Manchester United er á heimavølli, og har hava teir verið í stórformi í hesum kappingarárinum.

**MANCHESTER UNITED-CHELSEA**
Premier League
Sunnudagin 8/5 kl. 16.10